## Vinnuvitan nr. 100

Í gjár kom blað nummar 100 út hjá Vinnuvitan. 2. desember í 2004 kom Vinnuvitan út fyri fyrstu ferð, og 31. mai 2007 útgáva nummar 100 á hillunum. Í oddagrein í nýggjastu útgávu fegnast blaðstjórin Óli á Deild Olsen, um at føroyska samfelagið, og ikki minst vinnulívið, sum tikið verður til, hava tikið blaðið til sín. Á Vinnuvitan fegnast tey um at hava prentað 100 útgávur av blaðnum. Í farnu viku var fagnaðurin í Vágsbotni stórur, tá Sosialurin fylti 80 ár. Útvarp Føroya hátíðarhelt hálvthundrað ára dag teirra í fjør, og næsta ár fyllir Dimmalætting 130.



## Siga frá fongulsmissión í Rumenia

Frá 31. mai til 7. juni vitjar danin Thorkil Jørgensen saman við Hans Jacob á Lava í Føroyum. Teir fara at hava møtir kring landið, har teir greiða frá arbeiði teirra fyri fangum í Rumenia. Vanliga vitja teir í fongslunum einar seks ferðir um árið, og meta teir seg hava tosað Guds orð fyri eini 40.000 fangum íalt. Møtiskrá teirra er henda: Byrjað varð í gjárkvøldið í Oasuni í Hoyvík, í kvøld verða teir í Hebron í Leirvík og leygarkvøldið í Kelduni í Skálafirði. sunnudagin luttaka teir við trý møtir – kl. 11 í Filadelfia í Vágum, kl. 18 í Evangeliihúsinum í Havn og kl. 22 luttaka teir á útimøti á Vaglinum.

Fiskimenn og reiðarar:

# Brynja seg til harðan dyst



- Reiðarar skulu ikki halda, at teir kunnu keypa skip fyri hundraðtals milliónir fyri síðani at koma til fiskimannin at biðja um pengarnar. Vit hava longu givið reiðarunum fleiri milliardir og tað skulu vit nú hava aftur sigur Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum

**– Tá ið samráðingar verða við reiðararnar í heyst, fara vit at krevja, at hýruprosentið verður munandi hækkað, sigur formaðurin í Fiskimannafelagið**

MANNINGARHÝRUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fiskimenn skulu nú hava munandi meiri í inntøkum.

Tað verður eitt treytaleyst krav frá Fiskimannafelagnum, tá ið samráðingar verða aftur við reiðararnar í heyst.

Sáttmálin millum Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið gongur út 30. november í ár og tá ið samráðingarnar verða, fer Fiskimannafelagið at krevja munandi inntøkuhækkingar.

Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, sigur, at Fskimannafelagið fer at krevja, at hýran skal hækka fleiri prosent, annars verður ein nýggjur sáttmáli ikki góðtikin.

– Sjálvandi fara allir partar at gera sítt ítarsta fyri at finna eina semju, tí endar tað við at skipini verða løgd, verður tað samfelagnum til stóran skaða, sigur hann.

Kortini staðfestir hann, at vilja reiðararnir ikki góðtaka, at hýruprosentið fer munandi upp, er onki at gera, uttan at leggja skipini.

Sostatt ásannar hann eisini, at fær Fiskimannafelagið eina munagóða ábót hesuferð, er vandi fyri, at fiskiflotin verður lagdur.

### Hava givið reiðarum milliardir

Formaðurin í Fiskimannafelagnum heldur seg hava góðar orsøkir til at seta hørð krøv í næstu samráðingunum við reiðararnar.

– Í nítiárunum lækkaðu hýruprosentini hjá manningunum á fleiri skipabólkum nógv.

Hann vísir á, at hýruprosentið hjá manningunum á nótabátunum er nógv lækkað og tað sama gjørdi prosentið hjá manningunum við línuskipum, tá ið svøvlalínan kom umborð.

Men hesar lækkingarnar komu ongantíð upp á hýruprosentini aftur og sostatt eru fiskimenn rættiliga nógv afturúrsigldir og hýruprosentini eru av tí sama nógv lægri, enn tey eiga at vera.

Jan Højgaard sigur, at sostatt hava fiskimenn á hendan hátt givið reiðarunum eina gávu upp á hundraðtals milliónir, kanska milliardir og tað er ikki nógv galið, at vit í veruleikanum hava goldið ein stóran part av flotanum.

- Og nú er stundin komin til at fiskimenn fáa hetta aftur, leggur hann afturat.

Hann vil kortini ikki enn siga, hvussu stór krøvini verða.

– Men kravið er ein munagóð hækking og í summum førum er talan um, at hýruprosentið skal hækka fleiri prosent, sigur hann.

### Reiðarar keypa-fiskimenn betala

Men nú hava skipara-og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið staðfest í eini frágreiðing, at reiðarar rógva frammundir, at prosentbýtið ímillum skip og manning verður broytt. Tað kann bara merkja, at manningarhýrurnar skulu lækka. Orsøkin til tað er helst, at í summum førum eru skip og fiskirættindi keypt so dýrt, at tað tyngir munandi um raksturin. Merkir Fiskimannafelagið nakað til hetta?

– Hetta merkja vit eisini. Í løtuni merkja vit tað mest við tað, at í summum førum royna reiðarar at snúgva sær uttanum sáttmálan fyri at spara útreiðslur. Tað fara vit sjálvandi heldur ikki at góðtaka. – Men eg vóni heldur ikki, at reiðarar hava keypt skipini fyri ovurhonds upphæddir í eini vón um, at teir kunnu koma til fiskimenn við rokningini.

– Vit hava longu givið teimum milliardir og geva teimum ikki meiri. Teir skulu ikki spenna seg fyri hundraðtals milliónir og lata tað ganga útyvir fiskimannin.

– Vit fara ikki at góðtaka grundgevingar frá reiðarum um, at tað er so tungt at reka skipini, at teir hava ikki ráð at hækka hýrurnar. Teir skulu ikki seta seg fyri dýrari skip enn at teir klára at betala fiskimonnum eina hóskandi hýru.

– Fiskimenn eru ein týðandi partur í samfelagshjólinum og vit hava heilt avgjørt ongan áhuga í at ein stórur partur av vinninginum endar á útlendskum hondum ígjøgnum føroyskar stráðmenn.

– Tí fara vit at royna at varðveita sum mest í umfari í Føroyum og tað er ein orsøk afturat til at krevja, at hýrurnar skulu hækkast.

## Ongin viðmerking til lønarkrøv

**Formaðurin í Reiðarafelagnum hevur onga viðmerking um lønarkrøvini frá Fiskimannafelagnum**

MANNINGARHÝRUR
*Áki Bertholdsen*

– Ongin viðmerking.

Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagið hevur als onga viðmerking til krøvini, sum formaðurin í Fiskimannafelagnum boðar frá í aðrari grein her á síðuni.

Men hann staðfestir, at tað er ikki almenna áskoðanin hjá Reiðarafelagnum, at býtið ímillum skip og manning skal broytast, soleiðis sum Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið boða frá í eini viðmerking til lógina um vinnuligan fiskiskap.

– Hvat onkur einstakur reiðari kanska hevur sagt ella ikki, kann Reiðarafelagið onki gera við, sigur Jákup Sólstein.

– Vit hava ikki boðað frá okkara støðu til hýruprosentini fyri nakran skipabólk og tað ætla vit heldur ikki at gera, fyrrenn samráðingar verða, sigur Jákup Sólstein.

# Svartiper endar hjá okkum

**– Fyrr ella seinni endar trupulleikin hjá manningunum. Men so leingi hesar garvillu skipasølurnar ikki halda uppat, kemur ikki upp á tal at slaka, sigur formaðurin í Skipara-og Navigatørfelagnum**

MANNINGARHÝRUR
*Áki Bertholdsen*

– Fyrr ella seinni endar trupulleikin hjá okkum.

Eyðstein Djurhuus, formaður í Skipara-og Navigatørfelagnum, er alt annað enn fegin um gongdina í fiskivinnuni.

Tað er serliga hesir ovurdýru skipahandlarnir, hann hugsar um.

Hann vísir á, at tað eru nógv dømi um, at skip og fiskirættindi verða keypt so dýrt, at tað er øgvuliga torført at fáa skilagóðan rakstur burturúr.

Tú ivast hann ikki í, at fyrr ella seinni fara reiðarar at krevja, at hýrurnar hjá manningunum skulu lækka fyri at fáa bíligari rakstur.

Hann sigur, at hetta er ein gongd, sum tey longu merkja.

– Í okkara dagliga samskifti við reiðarar fáa vit í heilum at vita frá teimum, hvussu tungt at tað er reka skipini.

Kortini staðfestir hann, at í teimum samráðingum, sum hava verið við reiðararnar, eru enn ongi formlig krøv komin um at lækka hýrurnar.

Men hann er púra sannførdir um, at fyrr ella seinni endar hesin trupulleikin á samráðingarborðinum, tí rokningin skal jú gjaldast og tað er onki at ivast í, at hon verður bara skumpað niður ígjøgnum skipanina, so at hon til seinast at enda hjá manningini.

Hinvegin ger hann eisini púra greitt, at tað verður av ongum.

– So leingi hesir garvillu skipahandlarnir fara fram, kemur ikki upp á tal at slaka fyri krøvum frá reiðarum um at lækka hýruprosentið, sigur Eyðstein Djurhuus.